## DAGSINS MEINING

# Tjóðpallur - eitt stórt framstig

Løgtingið hevur mestsum einmælt samtykt lóg um Tjóðpall Føroya. Leiklistin er elligomul list, ja, tað eru tey, sum halda, at hetta er hin elsta listin hjá mannaættini. Tað hevur í fleiri mentanarligum álitum verið mælt til at seta stovn ein almennan leikpall. Tjóðpallurin kann metast sum eitt framhald av Leikpalli Føroya, ið varð settur á stovn fyri nøkrum árum síðan sum ein grunnur. Við Leikpallinum kom leiklistin á fíggjarlógina og fekk hervið ta viðurkenning, ið henda listagrein hevur uppiborið. Hetta var í sjálvum sær eitt framstig og eiga tey fólk, sum í gjøgnum árini hava virkað innan Leikpallin stóra tøkk uppiborna. Hinvegin var øllum greitt, at við tí formi, ið Leikpallurin hevði, vóru møguleikarnir fyri menning og vøkstri avmarkaðir.

Tjóðpallurin er eisini eitt úrslit av teimum framstigum og tí menning, sum hevur verið innan yrkisleiklistina, síðan Føroya fyrsti yrkislærdi leikari, Eyðun Johannessen, kom aftur til heimlandið. Skal nakar einstaklingur nevnast í nýggjari føroyskari leilistasøgu, so má tað vera Eyðun. Tað hevur sjálvsagt eisini gagnað sakini, at Eyðun, hóast hann er vorðin navnframur uttanlanda, hevur valt at virka í Føroyum. Hetta eiga vit øll at fegnast um.

Eins og Leikpallur Føroya fevndi um bæði yrkisleik og áhugaleik, fevnir nýggja lógin um báðar greinir. Av teimum mentanarligu álitum, ið eru komin uppá prent, skilst, at tørvur er á bæði yrkisleiki og áhugaleiki. Tað er tí skilagott, at nýggja lógin tryggjar áhugaleikin, samstundis sum hon fyriskapar mennandi karmar um eina føroyska yrkisleiklist. Lógin um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist er eitt stórt mentanarligt framstig. Hon er ein almenn viðurkenning av tí týdningi leiklistin hevur fyri tjóðina, og hon skapar góðar virkismøguleikar fyri tey, ið hava valt sær útbúgving sum yrkissjónleikarar. Í hesum høpi eigur at verða mint á, at játtaninin á fíggjarlógini er ein fortreyt fyri, at nýggja lógin kann koma at virka eftir ætlan. Tað er tí at vóna, at løgting og landsstýri liva upp til ta fíggjarligu ábyrgd, sum nýggja lógin leggur á hesar myndugleikar. Stóri meirilutin fyri lógini boðar í so máta frá góðum. Sosialurin ynskir leiklistini og øllum Føroya fólki til lukku við stóra mentanarliga framstiginum, Tjóðpalli Føroya.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Foreldragjald

**Turið Jacobsen**

Nógv hevur verið sagt og skrivað seinastu tíðina um, at ein kæruavgerð mundi ført við sær, at gjald fyri ergo- og fysioterapeutiska viðgerð av børnum við varðandi breki skuldi vera treytað av foreldrainntøku.

Tey, sum hava sagt sína hugsan um málið, hava verið umboð fyri brúkararnar, Almannaverkið og politikarar. So vítt eg veit, hava umboð fyri fakbólkarnar, sum geva viðgerðina, talan er um, ikki tikið lut í kjakinum. Eitt endamál við viðgerðini eigur at vera, at børnini við varðandi breki skulu fáa sum mest burturúr henni. Tað er tí í hesum kjakinum neyðugt at koma inn á tann tídningarmikla fakliga partin, sum viðvíkur, undir hvørjum umstøðum viðgerðin verður givin, so at hetta málið verður nátt. Eisini er neyðugt at koma inn á, hvussu viðgerðin kann mennast, so at vitan innan økið verður samlað og er til taks bæði viðvíkjandi tí einkulta barninum við varðandi breki og fyri børn við varandi breki sum heild.

Tveir fysioterapeutarnir starvast á Sernámsdeplinum og hava teir ongan møgulleika at røkka øllum børnunum í Føroyum, sum hava varðandi brek. Tískil gongur at kalla øll viðgerð av føroyskum børnum við varðandi breki fyri seg hjá ergo- og fysioterapeutum í privatari vinnu og er hetta orsøkin til kjakið um foreldragjald. Kjakið, sum nú hevur verið um foreldragjald, er eitt sjálvsagt høvi til eitt fakligt kjak um, hvørjar umstøður eru best nøktandi, tá talan er um ergo- og fysioterapeutiska viðgerð av børnum við varandi breki. Við míni fakligu vitan sum ergoterapeutur og við at fylgja við í útlendskum fakbløðum, eri eg sannførd um, at útreiðslan, sum almannaverk og sjúkrakassar hava av hesari viðgerð hjá ergo- og fysioterapeutum í privatari vinnu hevði komið samfelagnum og børnum við varðandi breki nógv meira til góðar, um hon var nøtt til ergo- og fysioterapeutar, sum starvaðust innanfyri almanna- og skúlaverkið.

Í londunum rundanum okkum sleppa tey undan hesum kjakinum um foreldragjald ella ikki. Har starvast ergo- og fysioterapeutar innan almanna- og skúlaskipanirnar, har børn við varandi breki hava sína dagligu gongd. Tvs. fysio- og ergoterapi er ein natúrligur partur av tí tvørfakliga samstarvinum rundanum børnini, har tey eru og umfatar eisini tørvsmeting av hjálpartólum. Hetta skapar grundarlag fyri menning av neyðugari fakligari vitan innan skúla- og almannaverkið, sum kemur børnunum til góðar.

# Fyrilestrar um útbúgving og "dannilsi" á Fróðskaparsetrinum og Føroya Studentaskúla

TÍÐINDASKRIV

Mentamálaráðið og Fróðskaparsetur Føroya hava boðið Harry Haue, lektara, dr. phil. frá Dansk Institut for Gymnasiepædagogik, Syddansk Universitet í Odense, til Føroya at halda fyrilestrar um Almendannilsi og miðnámsútbúgvingar.

Harry Haue er mag.art. í søgu frá Aarhus Universitet í 1973 og hevur í mong ár starvast sum studentaskúlalærari, men tey seinastu árini hevur han starvast sum granskari á Dansk Institut for Gymnasiepædagogik, Syddansk Universitet.

Herfyri vardi hann doktararitgerð sína Almendannelse som ledestjerne á Syddansk Universitet í Odense. Bókin er vorðin sera væl móttikin í Danmark, og høvundurin hevur fingið mong rósandi orð fyri verk sítt. Ikki minst tí granskingararbeiði hansari hevur stóran týdning júst nú talan er um at broyta allar miðnámsútbúgvingarnar í Danmark.

Harry Haue er kendur sum ein góður, greiður og áhugaverdur fyrilestrahaldari. Tilsamans heldur hann tríggjar fyrilestrar á Føroyaferðini, ein almennan, ein, sum fyrst og fremst er ætlaður lesandi og lærarum á Fróðskaparsetrinum, og ein, sum er ætlaður lærarum og næmingum á miðnámsútbúgvingunum. Øll áhugaði eru kortini vælkomin til allar fyrilestrarnar.

**Harry Haue, lektor, dr. phil.**
**Fyrilestrar um almendannilse og miðnámsútbúgvingar.**

*HÓSDAGIN 1. MAI 2003 kl. 19.30 Í OVASTOVU Í NÓATÚNI:*
Fyrilestrarheiti:
**Almendannelse, hvad er det?**
***Almennur fyrilestur fyri øllum áhugaðum.***

*FRÍGGJADAGIN 2. MAI 2003 kl. 10.00 Á FØROYAMÁLSDEILDINI Á FRÓÐSKAPARSETRINUM:*
Fyrilestrarheiti: **Dannelse og dannelsesbegrebet i skole og samfund.**
***Fyrst og fremst ætlað lærarum og lesandi á Fróðskaparsetrinum.***

*MÁNADAGIN 5. MAI 2003 kl. 14.40 Á FØROYA STUDENTASKÚLA Í HOYDØLUM:*
Fyrilestrarheiti: **Det gymnasiale skolesystems udvikling frem til i dag.**
***Fyrst og fremst ætlað lærarum og næmingum á studentaskúlum og miðnámsútbúgvingum.***


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.


# ítróttur

Nr. 79 • leygardagur • 26. apríl 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ingi yngstur nakrantíð á landsliðnum

**Tað er rættuliga sannlíkt, at Ingi Højsted ímóti Kasakstan fer at verða yngsti føroyski spælarin nakrantíð í altjóða skrásettum landsdysti**

LANDSLIÐSMET
*Jóannes Hansen*

Klokkan fýra seinnapartin í morgin fer føroyska fótbóltslandsliðið undir sína 85. uppgávu, síðani altjóða limaskapurin gjørdist veruleiki fyri skjótt fimtan árum síðani. Føroyar hava spælt 31 EM undankappingardystir, 30 HM undankappingardystir, fýra NM dystir, og uppgerðin á Svangaskarði verður 20. vinardysturin.

Í teimum 84 landsdystunum hava tilsaman 79 spælarar umboðað Føroyar. Tað er rættuliga sannlíkt, at í hvussu so er ein og ivaleyst fleiri spælarar, sum ikki hava verið á landsliðnum áður, fara at fáa møguleikan í morgin ella týskvøldið. Teir, sum ikki hava verið á landsliðnum áður, og sum hava møguleikan hesa ferð, eru Atli Danielsen, KÍ, Jan Ingi Petersen, B68, Símun Samuelsen, GÍ, og Ingi Højsted, Arsenal. Atli og Jan Ingi eru 19 ára gamlir, og Símun Samuelsen verður átjan 21. mai. Ingi Højsted er nógv tann yngsti í hópinum hesa ferð. Hann verður ikki átjan fyrrenn 12. november, og um hann verður settur á vøllin ímóti Kasakstan, so verður hann yngsti føroyski landsliðsspælarin nakrantíð.

Yngsti spælarin higartil hevur verið Jón Rói Jacobsen. Hann var 18 ár 1 mánað og 25 dagar, tá ið hann í EM undankappingardystinum ímóti Sveis 2. juni í 2001 á heimavølli varð skiftur inn.

Um Ingi verður skiftur inn ímóti Kasakstan, verður hann meiri enn eitt hálvt ár yngri landsliðsspælari, enn Jón Rói Jacobsen var fyri tveimum árum síðani, og



*Sum 15 ára gamal fór Ingi Højsted til Arsenal. Nú hevur hann sum 17 ára gamal møguleika at gerast yngsti føroyski landsliðsleikarin nakrantíð*

Ingi verður samstundis fyrsti føroyski spælarin, sum verður á landsliðnum, áðrenn hann er fyltur átjan ár (Símun Samuelsen hevur eisini møguleika at røkka hesum metinum).

## Liam Brady er venjari

Í gjár var tað ikki greitt, um Ingi Højsted verður tøkur til dystin í morgin. Men tað var greitt, at hann verður tøkur týsdagin, og sambært hjálparvenjaranum á landsliðnum, Jógvani Martin Olsen, so er Ingi Højsted so væl fyri, sum hann ongantíð hevur verið áður.

Ingi er á talentliðnum hjá sjálvum Arsenal. FSF vildi hava, at Ingi skuldi koma til Føroya í gjár, men tað setti venjarin hjá Arsenal seg ímóti.Hann vildi hava, at Ingi skuldi spæla á talentliðnum í dag.

Venjarin hjá Arsenal talentunum er ikki hvør sum helst. Talan er um Liam Brady, sum tilkomnu fótbóltshugaðu føroyingarnir kennast við. Hann er íri og var krumptappurin á Arsenal miðvøllinum síðst í sjeyti árunum og fyrst í áttati árunum, áðrenn hann varð seldur til Juventus. Liam Brady varð mettur at vera ein tann besti miðvallarin í Onglandi tann tíð tað var.

– Ingi var við á venjingarleguni í Spania. Tá gekk tað rætta vegin hjá honum, og síðani hevur tað gingið støðugt framá. Síðani hann kom til Onglands hevur Ingi verið nógv plágaður av skaðum. Nú hevur hann í fleiri mánaðir vant og spælt uttan at hava verið skaddur. Eg rokni møguleikan stóran fyri, at hann fer at fáa møguleikan eina løtu ímóti Kasakstan, sigur Jógvan Martin Olsen.

## Fleiri met

Jens Martin Knudsen verður í føroyska málinum í morgin. Hvørja ferð hann umboðar Føroyar setur hann nýtt met sum elsti landsliðsspælarin í altjóða skrásettum dystum. Veteran málverjin verður 36 ár 11. juni ella sama dag, sum Týskland og Føroyar fara at spæla á Tórsvølli.

Næstelsti spælarin á landsliðnum hesa ferð er Jóhannis Joensen. Hann verður 33 27. november, og tað skal tískil nógv til, áðrenn Jóhannis fer at taka metið sum aldursforseti á landsliðnum frá Jens Martini.

Óli Johannesen verður ikki á liðnum í morgin. Hann verður upptikin av landskappingardysti á heimavølli í Hvidovre, har teir fara at taka ímóti Vejle, sum hevur Christian Høgna Jacobsen í hópinum. Óli Johannesen verður á føroyska liðnum týskvøldið, og tá fer hann sum fyrsti føroyingurin at spæla á landsliðnum fyri 60. ferð.

## Møguligt lið

Umframt Óla Johannesen vera útisetarnir Jákup Mikkelsen, Christian Høgni Jacobsen og Jón Rói Jaocbsen ikki við í morgin, og harafturat er tað mest sannlíkt, at Ingi Højsted ikki verður tøkur. Men tað er ein møguleiki fyri tí. Andrew av Fløtum og Rógvi Jacobsen vera í Íslandi við HB í morgin.

Tað er púra greitt, at Jens Martin Knudsen verður málverji í morgin. Tað er eisini greitt, at Fróði Benjaminsen og Julian Johnsson fara at hava sentralu leiklutirnar á miðvøllinum, og at Jákup á Borg verður ytstur í høgra miðvallarborði. John Petersen verður í álopinum.

Hans Fróði Hansen var ongantíð millum teir fyrstu ellivu í fjør. Um hann ikki verður tað í morgin, tá ið bæði Jón Rói Jacobsen og Óli Johannesen vera burtur, so er torført at síggja, hví boð verða send eftir honum. Tí er upplagt at rokna við, at Hans Fróði verður í miðverjuni saman við Pól Thorsteinsson.

Súni Olsen og Hjalgrím Elttør vera ivaleyst millum teir fyrstu ellivu. Spurningurin er, um Hjalgrím verður í álopinum saman við John Petersen, ella um hann verður í miðvallarplássinum í vinstru. Súni Olsen verður miðvallari í vinstru ella vinstri vongverji. Aðrir møguleikar á vongverjunum og í miðverjuni eru Jóhannis Joensen og Allan Joensen.

Ein møguleiki er, at teir fyrstu ellivu fara at vera hesir: Jens Martin Knudsen – Jóhannis Joensen, Pól Thorsteinsson, Hans Fróði Hansen, Allan Joensen – Jákup á Borg, Julian Johnsson, Fróði Benjaminsen, Súni Olsen – John Petersen, Hjalgrím Elttør.

Á beinkinum verða so í morgin Bjarni Johansen, Jan Ingi Petersen, Atli Danielsen, Heðin á Lakjuni, Símun Samuelsen og Jónhard Frederiksberg.

**Eftir dystin í morgin verður liðið til dystin týsdagin úttikið. Tá verða útisetarnir og teir báðir HB spælararnir tøkir.**